## 8.500 gestir á Akureyri

Vanliga búgva umleið 17.000 fólk á Akureyri í Íslandi, men í gjár vóru næstan helvtina fleiri fólk í býnum. Orsøkin var, at ikki færri enn trý stór ferðamannaskip lógu við bryggjuna. Tey bæði fyrstu, Costa Magica og Queen Victoria komu at bryggju gjáramorgunin, og um middagsleitið kom Astor afturat. Við skipunum vóru 6.000 ferðafólk, og manningarnar taldu 2.500. Sostatt fór fólkatalið á Akureyri úr 17.000 upp í góð 24.000, skrivar Morgunblaðið. Akureyri fær á hvørjum ári nógv ferðamannaskip á vitjan, og í hesum mánaðinum koma tólv skip afturat teimum, sum longu hava verið. Fleiri koma seinni í summar.



## Óheft nevnd skal býta kvotur

Gongur tað, sum tann grønlendska landsstýriskvinnan í fiskivinnumálum, Ane Hansen, ætlar, so skal landsstýrið lata frá sær rættindini at býta fiskikvotur. Ta uppgávuna skal ein óheft nevnd hava, sigur Ane Hansen, sum samstundis ætlar at kanna møguleikarnar fyri at lata játtaðar kvotur galda fleiri fiskiár. Landsstýriskvinnan sigur við kringvarpið KNR, at verandi skipan við árligum kvotum er trupul og forðar vinnuni at menna seg. Eftir ætlanini hjá Ane Hansen skal landsstýrið framvegis áseta heildarkvoturnar fyri tey einstøku fiskasløgini, sum verða grundaðar á burðardygga veiði. Síðani skal tann óhefta nevndin gera av, hvussu kvoturnar skulu býtast, sigur hon.

## Nóg mikið av heilivági

Apoteksverkið hevur á goymslu nóg mikið av heilivági til fyrifbyrgjandi viðgerð og viðgerð av fólki, um fleiri fólk fáa svínakrím

Føroyar eru væl fyri við heilivági, nú fyrsti tilburðurin av svínakrími er staðfestur, og fleiri fólk eru farin antin í fyrbyrgjandi viðgerð ella eisini í viðgerð fyri svínakrím.

- Vit fylgja tilbúgvingarætlanini, og eru í fasu fimm, sigur Heri Mørkøre, landsapotekari.

Fasa fimm sigur, at takan er um størri bólkar, men spjaðingin frá fólki til fólk eru framvegis staðbundin. Smittan er avmarkað til húski og millum fólk við tøttum samstarvi.

Ein kommunulækni kom við fráboðanini um mannin, sum var komin úr USA, og síðan hava børnini í býlingshúsinum í Maritugøtu og foreldrini at børnunum fingið heilivág.

Eftir tilbúgvingarætlanini eru bestu ráðini, soleiðis sum støðan er, at royna at skýggja smittu.

Ferðafólkini, sum komu úr Danmark við sama flogfari sum smittaði maðurin, fingu boð um at venda sær til egnan kommunulækna, og Heri Mørkøre veit ikki meira um tað.

### Fleiri sløg av heilivági

Apoteksverkið liggur inni við øllum sløgunum av heilivági, sum finnast, og bíløgd eru koppingarevni. Koppingarevnini koma til Føroya um tveir-tríggjr mánaðir.

Heri Mørkøre heldur tað vera ilt at vita frammanundan, hvussu stórur tørvurin verður á heilivági, tí tað er ymist, hvussu heilivágurin virkar.

Landsapotekurin minnir á, at krímsjúkur nkoma við jøvnum millumbilum.

- Og so kunnu vit fegnast um, at tað er summar nú, tí tað vanliga er, at krímsjúkur breiða seg um veturin, sigur Heri Mørkøre, sum ikki sær festivalar og ólavsøku sum hóttanir, hóast nógv fólk tá koma saman.

# Ólavsøka ein smittubumba

**Hóast nýggja krímið ikki er ein álvarslig sjúka, kemst ikki uttanum, smittuvandin er stórur, tá nógv fólk savnast og koma í kontakt við hvør annan staðfestir Bjarni á Steig, virkandi Landslækni**

NÝKRÍM
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Virkandi Landslækni, Bjarni á Steig, staðfestir, at tað kemst ikki uttanum at talan er um stóran smittuvanda, tá nógv fólk savnast, eins og tey gera á ólavsøku. Hann mælir tó fólki til at uppføra seg eins og vanligt*

Nýggja krímið er komið til Føroya. Ein tilburður er staðfestur í Føroyum, ein maður, ið kom til landið við Atlantsflogi týsdagin klokkan 14.

Men tá Landslæknin upp í fleiri ferðir hevur boða frá, at nýggja krímið ikki er nógv álvarsligari enn vanlig influensa, hví er so nógv fokus og so stór tilbúgving sett í verk til júst hetta krímið, hava vit spurt Bjarna á Steig, virkandi Landslækna.

- Tað sum er umráðandi í hesum er, at tað er ein nýggj sjúka. Hon er ikki í registaranum yvir skrásettar sjúkur, og man hevur altíð fyrivarni tá tað er ein nýggjur variantur, staðfestir Bjarni á Steig.

Hvat hendur, um tú fær hetta krímið?

- Tað sum hendur er, at hetta er eitt virus sum fer inn og ávirkar immunverjuna, eins og vanligt krím. Vit síggja eisini at tað eru fá, ið eru deyð, færri enn við vanligum krími, leggur Bjarni á Steig dent á.

Tá krímið ikki er so álvarsligt, hví so stóra tilbúgving, isolatión og ótta?

-Í tilbúgvingini liggur, at man metir fyrst og fremst um tað er nýtt, og so um tað er álvarsligt. Hesaferð er tað ikki álvarsligt, men nýtt. Í Føroyum eru vit ikki í fasu 6, tað vil siga at vit hava ikki staðfest smittu frá fólk til fólk. Enn er bert 1 tilfeldi í Føroyum, men hetta fer neyvan at vera verandi soleiðis, staðfestir Bjarni á Steig.

### Ólavsøkan kann verða ein smittubumba

Hóast nýggja krímið ikki er álvarsligt, hevur tað í øðrum londum víst seg at smitta sera illa. Hetta kann koma at vera sera viðkomandi fyri Føroyar, nú summarið er í hásæti.

Henda komandi mánaðin verða nevniliga fleiri festivalar, slag í slag, og ólavsøkan, tá tað savnast millum 15- 20.000 fólk í miðbýnum í Havn, og Bjarni á Steig, virkandi Landslækni, staðfestir, at tað kemst ikki uttanum, at smittuvandin er stórur, tá so nógv fólk savnast, og tey klemmast og mussast og fløskur ganga munn av munni.

Sostatt kann ólavsøkan gerast ein sonn smittubumba, er smittan millum ólavsøkugestirnar.

Men Bjarni á Steig heldur tó fast við, at vit eiga at fyrihalda okkum róligani.

- Vit ráða fólki at uppføra seg akkurát sum vanligt. Hevur mann illgruna um, at man hevur verið í samband við onkran, sum hevur krímið, og mann sjálvur fær symptom upp á krím, eigur man at lata seg kanna. Men er man frískur, og eingi symptom hevur, er eingin orsøk at venda sær til læknan, staðfestir Bjarni á Steig, virkandi Landslækni.

# Krímið kom í seinastu viku

**Enn er bara staðfest, at ein maður í Føroyum hevur fingið svínakrím, og illigruni er um, at sonurin eisini er sjúkur**

NÝKRÍM
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Leygardagin kom røringur í, tá ið landslæknin og heilsumálaráðið boðaðu frá, at fyrsti tilburðurin av svínakrími var staðfestur í Føroyum.

Maðurin hevði verið í USA og kom týsdagin 7. juli umvegis Danmark til Føroya.

Hann fekk krím og fór til lækna, og tá ið sonurin eisini fekk krím, fekk leiðarin í Býlingshúsinum í Maritugøti, har drongurin er um dagin, boð um at kalla bæði børn, foreldrur teirra og starvsfólkini í býlingshúsinum til kanningar

Tey fóru øll út á Landssjúkrahúsið, har tey í samsvari við tilbúgvingarætlanina ikki máttu fara inn á sjúkrahúsið, men tey vórðu kannað, meðan tey sótu í bilunum uttanfyri.

Samstundis hava myndugleikarnir heitt á ferðafólki, sum komu til Føroya seinasta týsdagin, samstundis sum skttaði maðurin, um at ringja til kommunulækna ella til Læknavaktina, um tey hava fingið krím síðan heimferðina. Tað vil siga, at tað er ein møguleiki fyri, at maðurin kann hava smittað onkran í flogfarinum.

Landslæknin og heilsumálaráðið leggja dent á, at hevur ein fingið sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um influensu, skal ein í mesta mun verða verandi heima fyri at avmarka smittuvandan sum mest.

- Til endalig greiða er fingin á, um ein er vorðin smittaður, skal ein hava samband við so fá fólk sum til ber og tí skulu fólk ikki fara til lækna, men ringja til lækna heimanífrá, siga heilsumyndugleikarnir.